# Lítil ólavsøka á Vaglinum

**Mentanarnáttina 4. juni var eitt heldur øðrvísi tiltak hildið í miðbýnum. Talan var um eina stóra útikonsert, við nógvum ymiskum og góðum bólkum úr øllum landinum**

MENTANARNÁTTIN
*Eydna Skaale*
*Eydna@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kr. Vang*



Nógv fólk, gott lag og deiligur tónleikur eyðkendi kvøldið, ið veruliga bar brá av, at stevnutíðin nú er komin. Onkur, í sonnum studentahýri, setti seg á vegin frammanfyri pallin at rugga í takt og syngja við. Onnur gingu, sum á stevnu, aftur og fram og prátaðu við kenningar, ímeðan uppaftur onnur einans vóru komin at lýða á tónleikin, og við hugtiknum andlitsbragdi løgdu tey merki til hvørt ljóð, sum kom av pallinum.

Tað sást somuleiðis týðuliga, at hetta er nakað, sum fólk hava saknað. Eitt deiliga frískt ískoyti til gerandisdagin. Ein tílík útikonsert hevur tann eginleika, at hon megnar at savna allar samfelagsbólkar. Áhoyrararnir fríggjakvøldið vóru ikki bert hálv- ella heilfull ung fólk, sum tað aloftast er til konsertir. Bæði ung og nøkur av teimum, ið ikki eru so ung longur, høvdu leitað sær oman at lýða á tónleikin og hugna sær saman.

Hóast hon ikki byrjaði fyrr enn klokkan var farin av 23, so vóru nógv fólk til alla konsertina, og hýrurin var góður. Veðrið var tíbetur til vildar, annars hevði eitt tiltak av hesum slag verið deyðadømt. Men í miðbýnum var veruligt lív í fríggjakvøldið, og tiltakið eydnaðist avbera væl.

Bólkarnir spældu sera fjølbroyttan tónleik, so har var nakað fyri øll at heinta. Eitt sera gott tiltak, sum avgjørt átti at verið endurtikið.







# Nógv fólk á mentanarnáttini

**– Øll hava latið ótrúliga væl at mentanarnáttini. Bæði tey, ið skipaðu fyri tiltøkunum, handlar og vanligu borgararnir hava latið sera væl at tiltakinum, sigur Ingigerð á Trøðni, samskipari av mentanarnáttini**

MENTANARNÁTTIN
*Eydna Skaale*
*Eydna@sosialurin.fo*

– Handlarnir høvdu úr at gera og teir seldu serstakliga væl hetta kvøldið. Tað vóru nógv fólk í býnum allan dagin, og eg havi fingið bæði uppringingar og mailar frá vanligum fólki, ið hava takkað mær fyri eitt sera væleydnað tiltak. Tey, ið skipaðu fyri hesum ymsu tiltøkunum runt um í býnum hava eisini latið sera væl at, tí tað vóru so nógv fólk til øll tiltøkini. Eg haldi, at hvørt einasta tiltak varð væl vitjað, sigur Ingigerð á Trøðni.

Hon sigur, at fleiri staðni rúmaðist ikki fleiri fólk inn, t.d. á Vertshúsið og til Notkabarettina. Í smiðjuni í Lítluvík vóru brandmenn við stigabilinum, og har var long kø av fólki, ið vildi sleppa upp í stigan. Í Sjónleikarhúsinum var góður føroyskur dansur, við nógvum fólki, í Boysengarði var heilt nógv fólk og lýddi á Tórshavnar Kamarkór og summarframsýningin í Norðurlandahúsinum varð somuleiðis sera væl vitjað.

-– Eg veit, at tað komu heilt nógv fólk úr øllum pørtum av landinum. So tað vóru ikki bert havnarfólk, sum fóru sær ein túr í býin hetta kvøldið.

Ingigerð sigur, at tey fóru undir fyrireikingarnar longu í mars mánaði, tá tey høvdu tann fyrsta fundin við fyrireikararnar. Síðani tá, hava tey arbeitt miðvíst við tiltakinum.

– Fólki dámar hetta tiltakið. Tað sæst, tí tað eru so ómetaliga nógv fólk sum taka av tilboðunum, sum eru hendan dagin og um kvøldið. Og tað, at tað bert er eina ferð árliga ger, at tað fer maður av húsið, tí hetta veruliga er nakað serligt. Um vit fara at skipa fyri mentanarnátt fleiri ferðir árliga, missir hon líkasum virðið. Sum er, er hetta nakað heilt serligt, og tað skal tað halda á at vera, leggur Ingigerð dent á.

Hon sigur tó, at næsta mentanarnáttin, sum sostatt verður tann fimta upp í slag, longu er fastløgd. Hon verður fyrsta fríggjakvøld í juni 2005.



*Í Norðurlandahúsinum lat spennandi summarframsýningin upp mentanarnáttina 4. juni og tá vóru nógv fólk og hugdu. Framsýnararnir eru allir føroyingar.*
*Myndin vísir eina av fotomyndunum á framsýningini*
*Mynd: Jens Kr. Vang*



*Martin Nolsøe Simonsen er ein av framsýnarunum í Norðurlandahúsinum. Hann hevur arbeitt við list innan KT og tøkni*
*Mynd: Jens Kr. Vang*



VIT REINSA:
KLÆÐIR · GARDINUR · MØBLAPÓLSTRING
TEPPIR · EISINI REINSA VIT ARBEIÐSBÚNAR

OPIÐ:
MÁNADAG - FRÍGGJADAG KL. 10.00 - 17.00
LEYGARDAG KL. 09.00 - 12.00

GISTING Í MIÐBÝNUM:
EINKULT OG DUPULT RÚM. EISINI SUMMARÍBÚÐ

RUBA REINSARÍ
MAGNUS HEINASONARGØTA 15 · 100-TÓRSHAVN · TEL/FAX 31 63 01
FARTEL 22 28 47 · RUBA@POST.OLIVANT.FO

Sosialurin 341800